# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## CHE fokin

CHE samgongan er fokin, og orsøkin er at síggja til ein banal søga um innanhýsis klandur í Tinganesi um eina skrivstovu. Er hetta klandur tann veruliga og einasta orsøkin, so hava løgmaður og flokkur hansara ikki nakra serliga góða søk. Hetta klandrið í sjálvum sær er einfalt ov veik ein orsøk til at slíta eitt politiskt samstarv, sum ein hevur brúkt so nógva orku til at etablera og ikki minst: at verja. Eitt samstarv, sum hevði nýbrot og skilagóðar ætlanir í sínum skjøldri.

Seinasta útspælið hjá løgmanni kundi bent á, at kemiin millum floksformenninar báðar ikki hevur verið tann besta. Hartil kemur, at arbeiðslagið í samgonguni hevur verið vánaligt, og hetta hevur aftur elvt til sera vánaligan stabilitet í einum samfelag og eini tíð, sum so at siga hungrar eftir stabiliteti. Tað hevði helst tænt løgmanni og politisku skipanini betri, um løgmaður hevði brúkt hesa støðu sum grundgeving fyri at slíta samstarvið. Ein stjórn, sum ikki kann tryggja politiskan stabilitet, kann ikki halda fram, og tí hevur stjórnarleiðarin skyldu til at fáa til vega eina stabilitetsskapandi stjórn ella at leggja frá sær ella at útskriva val og hvat ein stjórnarleiðari nú annars hevur av valmøguleikum.

Øll duga at síggja, at her er annað og meira enn klandur um eitt høli. Tað hevði ivaleyst verið betri fyri trúvirði løgmans, um hann sostatt bara hevði staðfest, at henda politiska samansetingin megnar ikki at stýra landinum og at taka tær mongu og torføru avgerðir, sum ein skjótt versnandi altjóða búskaparlig støða krevur. Og hann kundi bara erliga sagt, um tað er ein av orsøkunum, at Javnaðarflokkurin kann t.d. ikki vera við til at skera blokkin við 114 milliónum, meðan vit við fullari ferð eru á veg inn í eina búskaparliga heimskreppu, so sum altjóða serfrøðingar siga er á veg. Tað er eingin skomm at viðganga, at ein verkætlan, sum ein trúi uppá, ikki lat seg fremja. Skrivstovukríggið má tí væl vera ein útleypari av vánaliga samstarvsklimanum og ringa huglagnum millum báðar floksleiðararnar og broyttu samfelagsstøðuni.

Tað er lætt at vera bakklókur, segði løgmaður á tíðindafundinum. Víst so, men tað krevur ikki stóran bakklókskap at ásanna, at hetta, at ein stjórnarleiðari so at siga gevur burtur stóran part av sínum málsøki og fyrisitingarapparati má geva samstarvstrupulleikar. Tað kann sostatt hava verið sjálv samstarvskonstruktiónin, hetta at Høgni fekk alt og Jóannes einki, sum var byrjanin til minkandi álitið, men løgmaður kann ikki skáka sær undan ábyrgdini av hesari konstruktión – hann eigur hana sjálvur. Men man kann kanska siga, at hann hevði vánaligar ráðgevarar, sum ikki hava lurtað væl eftir í søgutímunum!

Skrædlið er á mangan hátt ein sorgarleikur. Hetta tí, at landinum nú, sum løgmaður púra rætt sigur, tørvaði eina stjórn, sum lá eitt sindur vinstrumegin miðjuna í føroyskum politikki. Tað var ein skilagóð og spennandi nýggj roynd í føroyskum politikki, ið m.a. skuldi føra okkum longur á sjálvbjargnisleið og rudda upp í egnum húsi. Báðir floksformenn hava eftir øllum at døma ein part av ábyrgdini fyri, at samstarvið kollsigldi. Tann, sum hevur eygleitt politiska leikin seinastu mánaðirnar, hevur sæð trupulleikar, sum hvørgin formaðurin hevur havt tamarhald á. Teir hava heilt einfalt ikki megnað at halda frið og skil á sínum egnu. Floksdisiplin hevur verið ein býur í Sibiria, og hetta hevur sjálvandi verið við til at máttstjala báðar formenn og mundi hetta vera eygsýnligt fyri hyggjarum í gjárkvøldið.

Løgmaður hevur oman á alt fingið sær ein álvarsaman trupulleika, sum lutvíst er sjálvskaptur. Hann avdúkaði í sjónvarpinum, at hann hevði gjørt Tjóðveldinum "eina tænastu" við at flyta aðalstjórn í Mentamálaráðnum, sum var "eitt problem" fyri Tjóðveldi, út í Tinganes. Henda avdúking er ikki góð fyri løgmann. Hon vísir fyri tað fyrsta, at upprunaliga upplýsta grundgevingin var skeiv og hon vísir ein løgmann, sum er farin langt fyri at fáa politiska kabalu at ganga upp. Her hava báðir floksformenn ein stóran moralskan trupulleika. Hetta mál eigur nú at verða kannað út í æsur og roknast má við, at bæði umboðsmaður og landsstýrismálanevnd fara at kanna hetta mál. Hvat var tað fyri problem, ið Tjóðveldi hevði av aðalstjóranum. Almenningurin hevur nú rætt at kenna problemið, um ikki eftir skal standa, at tænstumaðurin varð fluttur av berum hevndarhuga Tjóðveldis.

Tað er torført at spáa um endan á hesi politisku støðu, sum í gjár var skapað. Okkurt bendir á eina ABC samgongu. Men hetta verður ein samgonga við einum nógv viknaðum Javnaðarflokki, sum hevur innanhýsis trupulleikar og sum hevur trupulleikar við trúvirðinum. At Tjóðveldi hevur somu trupulleikar er ein fátøk troyst. Stórt spell at hetta spennandi eksperimentið og nýbrotið millum C og E skuldi fáa eina slíka lagnu, tí her varð stungin út í kortið ein skilagóður búskapar- og sjálvbjargnispolitikkur.

**Sosialurin**

## Vánaligt stev í Tinganesi

(**Henda oddagreinin varð skrivað beint undan samgonguslitið í Tinganesi í gjár)**

Tað er eingin loyna, at arbeiðslagið og samgongustevið í Tinganesi hevur verið vánaligt, síðani CHE samgongan tók við. Seinasta ósemjan um tollfríu søluna av sigarettum er eitt gott dømi um hetta.

At landsstýrisfólkini ikki arbeiða og tosa saman, áðrenn tey taka avgerðir, sum raka økini hjá hvørjum øðrum, er samgonguni til lítlan sóma. Sjálvandi eigur fíggjarmálaráðharrin at ráðføra seg við vinnumálaráðharran, tá hann tekur eina so kollveltandi avgerð sum at steðga søluni av øllum tollfríum sigarettum. Sjálvandi eigur hann at spyrja hana um tær avleiðingar hetta fær fyri hennara málsøki. Tað hevur einki at gera við tann heilsupolitikk, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur sett út í kortið á hesum øki. Fíggjarmálaráðharrin veit, hvønn týdning sølan av tollfríum sigarettum hevur fyri partar av vinnuni. Almenni stovnurin Samvit, sum hevur ta týðandi uppgávuna at vera við til at menna føroyskt vinnulív, hevur fleiri ferðir roynt at ávara landsstýrismannin um avleiðingarnar av ultimativu avgerð hansara. Mongu fyritøkurnar í ferðavinnuni hava gjørt vart við hetta og landsstýriskvinnan í vinnumálum hevur roynt at sannføra starvsfelagan um sera óhepnu avleiðingarnar av hesum.

Men einki rínur við Karsten Hansen. Vit hava sjálvandi virðing fyri politikarum, sum hava vilja og dirvi til at taka kontantar avgerðir. Men hetta málið hevur als einki við tað at gera. Tvørturímóti er henda avgerð hansara eitt lykladømi um ein landsstýrismann, sum ikki virðir samstarv og samgongustev og dialog ella tey mongu, sum royna at halda lív í vinnulívinum her á landi. Vit hava fyrr hoyrt, hvussu nettupp Karsten Hansen hevur gjørt sær dælt av yvirfyri sínum veljarum í Miðflokkinum als ikki at virða demokratisku spælireglurnar, sum m.a. eru at spyrja og lurta eftir øðrum ikki minst í sínum egna baklandi, hinum landsstýrisfólkunum fyri ikki at tala um vinnuna.

Á hesum stað í gjár róstu vit løgmanni fyri at hava tikið upp táttin at vera við til at marknaðarføra føroyskt vinnulív, men vit mugu so í sama viðfangi viðganga, at í hesum máli hevur hann ikki megnað at fáa síni landsstýrisfólk at skilja, at tey kunnu ikki arbeiða í sjálvdrátti í málum, sum skaða sama vinnulív, ið løgmaður roynir at hjálpa og stuðla. Vit kunnu so bara vóna, at bæði løgmaður og landsstýrisfólk læra av hesum. Tvs. at landsstýrisfólk kunnu ikki einvíst taka avgerðir, sum skaða øki hjá øðrum landsstýrisfólkum, uttan at hesi hava fingið fyrilagt málið og kunnað gjørt vart við sína støðu. Soleiðis sum Karsten Hansen hevur borið seg at í hesum málinum, so kunnu vit bert staðfesta, at hann leggur sektina á, hvat onnur landsstýrisfólk hugsa og halda og ikki minst, hava ábyrgd fyri. Tað er ein óhaldbar støða hjá flokkum, sum saman vilja vera við til at menna og útbyggja hetta landið. Og hetta er nakað, sum stjórnarleiðarin ikki átti at góðtikið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.